Sørin Lisberg breyt ryggin í arbeiðsvanlukku:

# Tað nyttar einki at argast a

Teir arbeiddu á tekjuni á Høvdavirkinum í Leirvík og vóru næstan lidnir at leggja eina presending yvir ein part av takinum. Nakrir seymir vantaðu í, og Sørin Lisberg skundaði sær niður í bussin eftir seymi. Komin uppaftur, datt hann av knekkinum á tekjuni, ið ikki var liðug. - Presendingin lá leys útyvir og snýtti meg. Eg steig út í tóman heim! Fallið út av tekjuni var stórt, einar 7-8 metrar, og tað var hart og skurvut undir. Stoyturin hevur helst verið ógvusligur; ryggurin brotnaði, og tað eina rivjabeinið fór inn ígjøgnum annað lunga, sigur Sørin Lisberg, sum alt lívið kemur at sita í koyristóli



*- Tú kanst ikki sita og argað teg um eina vanlukku alt lívið. Tað fært tú einki burtur úr. Men eg haldi, tað er umráðandi at minna onnur, sum fara upp á tekjur, á vandan, sum lúrir – eisini, tá ið uppgávan sær léttast út, sigur Sørin Lisberg*

*Mynd: Arbeiðseftirlitið*

ARBEIÐSVANLUKKA

*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Sørin Lisberg er ættaður úr Vági. Hann er giftur Hallbjørg Eliasen, sum er úr Leirvík. Tey eiga børnini, Høgna, sum er 22 ára gamalur, Katrin, sum er 16 og Judith, sum er 13 ára gomul. Tey bygdu sær hús í Leirvík, har tey framvegis búgva. Hetta vóru eini vanlig sethús, tá ið tey vórðu bygd, men í dag eru húsini innrættað til ein mann, sum situr í koyristóli.

Ein álvarsom arbeiðsvanlukka førdi til, at Sørin kemur at sita í koyristóli restina av ævi síni.

Vanlukkan endavendi øllum lívinum hjá honum og familjuni, men Sørin er ikki fallin í fátt, hóast hann gjørdist 100% avlamin. Hann hevur havt lívsmót og sterkan vilja.

### Fall av tekjuni

- Vit arbeiddu úti á Høvdavirkinum í Leirvík við at bjálva og annað inni í bygninginum. Eg hevði frí frá mínum arbeiði við at smíða og hevði játtað at hjálpa teimum, sum arbeiddu á Høvdavirkinum. Ætlanin var at arbeiða har í tveir dagar, og vanlukkan hendi tann fyrra seinnapartin.

Sørin sigur, at teir skuldu bert upp á tekjuna, ið var rættiliga sløtt, at leggja eina presending útyvir ein part av henni, soleiðis at regn ikki kom niður á tað, sum bleiv málað inni í bygninginum.

- Hetta var eitt arbeiði, sum ikki bleiv mett til tað stóra. Tað skuldi bara taka eina 10-15 minuttir at fáa hetta gjørt. Nakrar lektir skuldu heftast yvir presendingina, so hon ikki lá leys. Okkum vantaði nakrar fáar seymir, tá ið síðsta lektin bleiv heft. Eg skundaði mær niður í bussin eftir seymi. Komin upp aftur á tekjuna, datt eg av knekkinum á tekjuni, ið ikki var liðug. Presendingin lá leys útyvir og snýtti meg. Eg steig út í tóman heim!

Fallið út av tekjuni á Høvdavirkinum var stórt, einar 7-8 metrar, og tað var hart og skurvut undir, har Sørin kom niður á.

- Undir mær lógu betongklumpar og annað hart tilfar. Stoyturin hevur helst verið ógvusligur; ryggurin brotnaði, og tað eina rivjabeinið fór inn ígjøgnum annað lunga. Helst eri eg dottin á vinstru síðu, sum eisini fekk stóran skaða og fór út av lagi, sum Sørin tekur til.

### Í respiratori

Sørin Lisberg minnist einki frá vanlukkuni, og hann minnist heldur ikki, tá ið hann datt út av tekjuni.

– Nei, tað minnist eg einki til, og tískil veit eg heldur ikki, hvørjir tankar kunnu mala í høvdinum á einum í teirri løtu, tú kemur soleiðis fyri.

Hann heldur, at hann hevur mist vitið í somu løtu, sum hann er fallin.

Tað skuldu nú ganga einir 20 dagar, áðrenn Sørin visti nakað sum helst til sín aftur.

Fyrst lá hann í 12 dagar í respiratori á Landssjúkrahúsinum, til hann varð fluttur niður á Ríkissjúkrahúsið í respiratori.

- Meðan eg lá, fekk eg eisini lungnabruna, tí eitt brotið rivjabein hevði stungið hol á annað